Formula kappingin:

# Stórur aktivitetur á transfer

**Fríggjakvøldið stongdi føroyski transfermarknaðurin, og Sosialurin hevur hugt eftir, hvørjir leikarar eru farnir frá ymsu feløgunum í formuladeildini, og hvørjir eru komnir til ymsu feløgini undan kappingarbyrjan tann 1. apríl**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Nógv munnu halda, at tá eitt fótbóltskappingarár endiliga er liðugt, so ræður friður á borgum hjá teimum ymisku feløgunum kring landið, men so er ikki. So skjótt sum eitt kappingarár er komið at enda, byrja feløgini at fyrireika seg til komandi kappingarár, og tá ræður um at vera fyrstur eftir leikarum, sum eru fríir á marknaðinum, ella at styrkja seg á teimum plássum, har eitt lið følir, at tað hevur brúk fyri nýggjum leikarum.

Hesin vetrarsteðgurin, sum spakuliga er byrjaður at halla, hevur verið minst líka hendingaríkur, hvat viðvíkur spælarahandlum, sum undanfarnu vetrarsteðgirnir hava verið. Fleiri feløg hava verið sera aktiv á tí sokallaða transfermarknaðinum, og hetta hevur ført við sær, at fleiri av feløgunum í formuladeildini kunnu stillað við nýggjum og spennandi leikarum til komandi uppgávurnar.

Fríggjakvøldið var so seinasti møguleikin hjá feløgunum at tryggja sær styrk til komandi kappingarár, tí tá stongdi transfermarknaðurin nevniliga. Sosialurin hevur hugt eftir, hvussu tey ymisku feløgini í formuladeildini hava styrkt seg, og hvørjar leikarar feløgini hava mist.

## Toppskjúttin til meistararnar

Sum øllum kunnugt, so vann HB meistaraheitið síðsta kappingarár, tá teir fóru fram við EB/Streymi á seinasta leikdegi. Ikki kann sigast, at HB hevur verið mest aktiva felag á transfermarknaðinum, men á pappírinum hava teir tó styrkt munandi um liðið.

Eftir lokið kappingarár í fjør boðaði royndi HB-málverjin, Bárður Johannesen, frá, at hann gavst at spæla fótbólt á hægsta stigið. Hetta førdi við sær, at HB manglaði ein málmann afturat Trónduri Vatnhamar. Tað gekk tó ikki long tíð, so hevði HB skrivað undir sáttmála við málmannin hjá VB, Marcin Dawid, og so var tann trupulleikin loystur.

Milan Kuljic, sum skuldi vera í HB seinasta kappingarár, hevur eisini fingið síni loyvir í lagi, so hann verður eisini partur av besta liðnum hjá HB komandi kappingarár.

Hetta eru tó ikki einastu nýggju leikararnir, sum HB hevur fingið í vetrarsteðginum. Toppskjúttin frá seinasta kappingarári, Christian Høgni Jacobsen, sum bert hevur leikt fyri barndómsfelagið, NSÍ, her á landi, valdi eisini at royna nýggjar leiðir eftir lokið kappingarár í fjør, og her fall valið á meistaraliðið, HB.

## Nýtt brøðrapar í EB/Streymi

Felagsliðið úr Sundalagnum hevur eisini styrkt um sítt lið fram ímóti nýggja kappingarárinum. Síðsta árið hava tvey brøðrapør sett sín stóra dám á felgasliðið. Her er talan sjálvandi um víkamenninar, Ronnie og Hans Paula Samuelsen, og kollfirðingarnar, Gert og Arnbjørn Hansen, og nú er enn eitt brøðrapar á veg til felagsliðið.

Brøðurnir úr Fuglafirði, Símun og Hanus Eliasen, spældu báðir við besta liðnum hjá ÍF í fjør, sum mátti ta tungu leið niður í 1. deild at spæla. Teir valdu tó báðir at ganga somu leið eftir kappingarárið í fjør, og valið fall á EB/Streym, sum nú er samansett av ikki færri enn trimum brøðrapørum.





*Bjarni Jørgensen hevur átt sín góða lut í góðu úrslitunum hjá Skála. Í ár verður hann tó at síggja á Argjum, har AB ivaleyst droymir um somu skjótu framgongd*

**AB 15 spælarar:**

Tilgongd:
- Bjarni Jørgensen frá Skála
- Fróði Clementsen frá EB/Streymi
- Súni Fríði Barbá frá B68
- Hanus Jacobsen frá GÍ
- Bogi Hermansen frá B36
- Hendrik Rubeksen frá HB
- Peder Christiansen úr Danmark
- Morten Overgaard úr Danmark
- Rógvi Holm (útleigaður til B36 í fjør)
- Danny Rasmussen úr HB
- Magnus Poulsen úr B36

Frágongd:
- Tony Rasmussen til Skála
- Allan Mørkøre til B36
- Eyðstein Jacobsen givin
- Rúni Nolsøe til B68

**KÍ 10 spælarar:**

Tilgongd:
- Kaj Ennigarð frá GÍ
- Gunnar G. Nielsen frá GÍ
- Kareen Smith úr USA
- Chris Cerony úr Onglandi
- Leon Bjartalíð spældi í lægri deildum

Frágongd:
- Ovi Nysted til B36
- Hjalgrím Elttør til NSÍ
- Atli Danielsen til Frem
- Christian Lundberg
- Sinisa Jovanivo

**EB/Streymur 8 spælarar:**

Tilgongd:
- Símun Eliasen frá ÍF
- Hanus Eliasen frá ÍF
- Bartal Hermansen nýggjur í formulahópinum
- Pætur Dahl nýggjur í formulahópinum
- Fríðrikkur Højsted nýggjur í formulahópinum

Frágongd:
- Fróði Clementsen til AB
- Jørgen Meitelberg til SÍ
- Gunnar á Steig til B68

**HB 7 spælarar:**

Tilgongd:
- Christian Høgni Jacobsen frá NSÍ
- Marcin Dawid frá VB
- Milan Kuljic
- Hans á Lag byrjaður aftur

Frágongd:
- Bárður Johannesen givin
- Janus M. Joensen givin
- Jovan Radinovic Panic til FS Vágar

**VB 7 spælarar:**

Tilgongd:
- Vlada Filipovic frá Skála
- Frits Eið frá Royn
- Martin Tausen nýggjur í formulahópinum
- Birni Kjærbæk nýggjur í formulahópinum

Frágongd:
- Marcin Dawid til HB
- Aco Pandurovic farin heim
- Tummas Pauli Olsen fyribils givin